# Drømmen om Panama

**Høvundur**: Nina Valsø (fødd 1962, vaks upp í eini lítlari bygd í Noreg).

**Leiksøga**: Drømmen om Panama gongur fyri seg í eini lítlari norskari bygd. Knut Harvigsen livir einsamallur saman við 25 ára gomlu dóttir síni Anitu. Tey bæði hava livað einsamøll, síðani mamman doyði, tá Anita var bert 7 ára gomul. Undir 2. Heimsbardaga var Knut Hartvigsen ein av teimum, sum sigldi vandasjógv og gjørdi manga vandafulla tænastu. Hesar upplivingar hava sett síni spor hjá hesum gamla sjógarpinum, men nú livir hann í brennivínstoku.

Tá pápin sigldi á verðinshøvunum, sendi hann postkort heim til dóttrina, og í sínari isolatión hevur hon identifisera seg so nógv við lívið og ferðirnar hjá pápanum, at hon er vorðin ein partur av tí.

Nú langt aftan á fær pápin, loksins og ov seint eina almenna viðurkenning fyri síni brøgd undir krígnum. Ein ungur tíðindamaður kemur í hesum sambandi til Anitu og pápan. Ígjøgnum hetta samband broytist lívið hjá bæði pápanum og Anitu fullkomuliga.

*Dreymurin um Panama* er ein rørandi søga, tragisk, men eisini humoristisk, og tað ger, at leikurin á ongan hátt er sentimentalur.

Av tí at leikurin gongur fyri seg í einum norskum bygdarumhvørvi, er hann á mangan hátt ”føroyskur”. Ein sera hugtakandi leikur, sum kann viðmælast.

**Leikarar**:
Anita, umleið 25 ár
Knut Hartvigsen, pápi Anitu, umleið 70 ár
Henrik Holst, tíðindamaður, umleið 25 ár

**Pallmynd**: Leikurin gongur fyri seg heima hjá Anitu og pápanum.

**Leiktíð**: Umleið 2 tímar.

***Manuskript kann bíleggjast frá Nordiska Strakosch Teaterforlaget Aps.***